

www.oljan.fo

**Jan Müller** 05 - 03 - 2012

# Føroyskir oljustjórar framløgur á ráðstevnu

Tað er ikki hvønn dag, at føroyskir oljustjórar hava framløgur á stórum altjóða oljuráðstevnum. Og at tríggir teirra gera tað um somu tíð man vera óhoyrt. Nú eru ikki færri enn tríggir føroyskir oljustjórar bidnir um at hava framløgur á somu oljuráðstevnu. Hetta hendir í døgunum 23. til 25. apríl, tá ráðstevnan Acquisition & Divestiture Summit 2012 verður í London um keyp og sølu av aktivum, um nýggjar marknaðir og leitiøki, um fígging og ymisk forrætningsmodell í oljuvinnuni og um útlitini at fáa vælútbúgvin fólk til vinnuna. Teir tríggir føroysku oljumenninir eru Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum, Graham Steward, stjóri í Faroe Petroleum og Teitur Poulsen, fíggjarstjóri í Det Norske Oljeselskab. Ráðstevnan setir fokus á júst hesi økini í oljuvinnuni, tí mett verður at 2012 fer at verða nógv merkt av handli við loyvum ol. Tí hava fyrireikararnir heitt á stjórar í feløgum, sum nettupp seinasta árið hava brúkt nógva orku uppá at keypa seg inn í og selja seg út úr loyvum. Eisini eru hesi feløg fyrimyndir fyri, hvussu gerast skal fyri at fáa sum mest og best burtur úr handli við eitt nú loyvum. Atlantic Petroleum keypti m.a. upp bretska oljufelagið Volantis og fekk harvið atgongd til fleiri nýggj leitiloyvi og brunnar. Faroe Petroleum gjørdi í fjør eina einastandandi og virðislønta avtalu sum tað fyrsta privata oljufelagið nakrantíð við almenna norska oljurisan PETORO við at selja Marialoyvi sítt í Norðsjónum í umbýti við trý framleiðandi loyvi. Det Norske Oljeselskab kom á breddarnar fyri at vera partur av risastóra Avaldsnesfundinum í Norðsjónum.